## Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2011

**Evnið fyri náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins 2011 er burðardygg ferðafólkavinna. Virðislønin verður latin einum undangongufólki, ið hevur stríðst fyri at fáa ferðafólkavinnuna í Norðurlondum at hava minni skaðiliga ávirkan á umhvørvið.**

Náttúru- og umhvørvisvirðisløn Norðurlandaráðsins verður í 2011 latin fyri 17. ferð. Virðislønin er 350.000 d.kr.

**Øll kunnu senda inn uppskot til vinnara.**
**Uppskotið skal grundgevast og lýsast soleiðis:**
1. Framløga og frágreiðing um tiltakið
2. Hvør fremur ella hevur framt verkið
3. Tiltakið skal hava fakliga dygd og týdning fyri stór øki í einum ella fleiri av Norðurlondunum
4. Uppskotið skal orðast á í mesta lagi tveimum A4-síðum og skal kunna kopierast

Vinnarin av virðislønini verður útnevndur av eini dómsnevnd, ið hevur umboð úr Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Danmark, Grønlandi, Føroyum og Álandi.

Uppskotið, ið skal skrivast á eitt serligt skjal, skal vera inni í seinasta lagi fríggjadagin hin 10. desember 2010, kl. 12.00. Skjalið fæst á heimasíðu Norðurlandaráðsins www.norden.org ella við at venda sær til skrivstovuna hjá norsku sendinevndini:

**Nordiska rådet**
**Den norska delegationen**
**Stortinget**
**N 0026 Oslo**
**Tlf. +47 2331 3568**
**e-post: nordpost@stortinget.no**

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

## Ketilpassaraskeið *(Grundskeið)*

Ketilpassaraskeið verður hildi á Vinnuháskúlanum í 5 fylgjandi fríggjadag, fyrstuferð 5/11 kl. 8.00 og endar 3/12.

Skeiði er 40 tímar.

Skeiðið er fyriskipa av arbeiðseftirlitinum.

**Undirvísingin fer fram á**
Vinnuháskúlanum undir Krakugjógv 5, Tórshavn.

Tilmelding á tel. 350350 ella info@vh.fo og skal verða skúlanum í hendi seinasta lagi týsdagin 2. november.

FO-110 Tórshavn | Postboks 104 | Tel 350 250 | Faks 350 251 | Mail: vh@vh.fo | www.vh.fo

## Sjúkrarøktarfrøðingur

**LÆKNAMIÐSTØÐIN í Klaksvík søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi.**

**Starvstíð:** 40 tímar um vikuna. Ongar vaktir eru.

**Umsøknarfreist:** 30. oktober 2010

**Byrjanardagur:** 01. januar 2011 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambart sáttmála við Felagið fyri Sjúkrarøktarfrøðingar.

Vit søkja eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi, sum saman við okkum, ið starvast í Læknamiðstøðini, vil verða við til at uppbyggja og menna eina sjúkrarøktarfrøðingartænastu í Læknamiðstøðini.

Arbeiðið er rættuliga fjølbroytt og sjálvstøðugt.

Arbeiðið fevnir um alt vanligt sjúkrarøktarfrøðingaarbeiði í einari kommunulæknaviðtalu, men høvuðsdentur fer at verða lagdur á fyribyrgjandi arbeiði, viðgerð og eftirkanning av sjúklingum við kroniskum sjúkum og vælferðarsjúkum.

Í løtuni verður arbeitt við at skipa arbeiðslagið í Læknamiðstøðini øðrvísi, og tí krevst, at tann, sum settur verður í starv, vil vera við í hesari umskipan, og dugir at tillaga seg til broyttar umstøður og hevur góð samstarvsevni.

**Umsøkn við avriti av prógvi og møguligum CV skal sendast til:**
*Magnus Magnussen*
*Kommunulækni*
*Postboks 138*
*700 Klaksvík*

## fk Matseðilin

*Hósdagin 14. oktober*
**Svínakambur – Grýturættur**

*Fríggjadagin 15. oktober*
**Stoktur medistari - Fiskafrikadellur**
**Nakkafilét**

*Leygardagin 16. oktober*
**Honningsglasera skinka**

*Mánadagin 18. oktober*
**Bankikjøt - Forlorin hara**

*Týsdagin 19. oktober*
**Bollar í karry - Rivjasteik**

*Mikudagin 20. oktober*
**Stoktur fiskur - Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

Fuglafjarðar Kommuna

## Námsfrøðingur til dagstovnin í Fuglafirði

**Søkt verður eftir námsfrøðingi at arbeiða við sertørvi í dagstovninum í Fuglafirði.**

- Vit hava brúk fyri einum námsfrøðingi at arbeiða 30 t. viku við sertørvi í dagstovninum í Fuglafirði. Starvið er tíðaravmarkað við setan frá, so skjótt sum til ber og fram til 30.juni 2011. Námsfrøðingar í gerast lidnir fyrst í komandi árið, eru eisini vælkomnir at søkja starvið.

**Vit sóknast eftir námsfrøðingi:**
- í kann arbeiða sjálvstøðugt, og er førur fyri at orða seg skrivliga
- hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum
- hevur umsorgan fyri børnunum
- er eldhugaður og jaligur
- hevur góð samstarvsevnir
- sær møguleikar fram um mørk.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt starv, har tú kanst brúka tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- samstarv við NSR tænastuna (náms- og sálarfrøðilig ráðgeving), sosialu deild og stovnar hjá Fuglafjarðar kommunu.

**Setanartreytir:**
Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri fast at vita um starvið við at venda sær til leiðaran í dagstovninum
Marius Joensen, á 737780.
Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða sendar til
Býráðsskrivstovuna, Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður
í seinasta lagi 28.10.2010.
Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknir ella onga at taka.

**Fuglafjarðar kommuna**




**Kranabilur av slagnum Man LE.12-220**
Hevur luftfjarðar aftan. Kranin er av slagnum Hmf 760 við 4 útskotum og tráðleysari fjarstýring. Grabbar og annað fylgir við. Ein gravimaskina av slagnum Hanix H36C við brekkara, skuffum og rampum.
**Tlf: 212779 - 312779**

**Ítróttarsosialurin altíð við har tað hendir**

